52-112/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 112/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe, løgtingsmanni, um ymisk koronutilmæli

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Eru ymisk koronutilmæli galdandi fyri ávikavist kirkjur, samkomur, mentanarlív og ávísar ítróttargreinar?
2. Hvat heldur løgmaður um, at ítróttartiltøk verða hildin innandura fleiri dagar á rað við fleiri hundrað áskoðarum?

Svar:

Spurningur 1 - 2
Nei, tað eru ikki ymisk tilmæli galdandi. Síðani 9. desember 2021 hevur almenna koronatilmælið verður at í mesta lagið 100 fólk eiga at samlast. Hetta hevur galdandi fyri øll tiltøk, bæði almenn og privat. Eg haldi tað hevur týdning, at øll tilmæli verða hildin.

Frá 21. januar er tilmælið um 100 fólk tillaga soleiðis, at har umstøðurnar loyva tí, kunnu fleiri enn 100 fólk savnast.

Í Tinganesi, 21. januar 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo